gult cyan magenta svart

Gloymi› ikki heimalívi›!

Pisurø›a, sum Turid Debes Hentze helt í Vági í summar

Tillukku vi› degnum. Aftaná skúlagond í 13 ár og stravnan eksamenslesna› hava tit nú frí. Eksamensoki› og tann stø›uga óró›in og spenningurin, kann nú leggjast aftur um bak. Ikki nógv er so herligt sum løtan beint aftaná náttarlesna og eksamenspress vi› høgum adrenalini at koma heilskapa› út í hinum endanum.

Beint nú liggur lívi› ví›opi› fyri tykkum. Tit hava longsta partin av vaksnamannalívinum frammanfyri tykkum. Tit standa á einum sera áhugaverdum vegamóti.

Frælsi

Tit hava eitt frælsi, sum tit ikki fáa aftur - fyrr enn kanska seint í lívinum. Eitt frælsi at velja og frávelja.

Tit eru leys av foreldrunum, fara nú av álvara úr rei›rinum og kunnu í hóskandi fjarstø›u frá teimum gera tykkara egnu ásko›anir. Lættari er at finna síni egnu bein burturi frá vanliga umhvørvinum.

Parforhold binda tykkum ikki. Enn skuldu hesi helst bara veri› romantisk og trupulleikaleys. Ta› liggur so væl fyri hjá tykkum beint nú. Nógva orku n‡tast tit ikki at brúka at hugsa um onnur. Ta› kemur seinni.

Útbúgvingarliga/vinnuliga eru møguleikarnir gó›ir í ár. Ein studentaskúlarektari seg›i nú um dagarnar, at møguleikarnir eru so stórir (tí árgangirnir eru so smáir og vinnulívi› rópar eftir fólki) - at tey ungu vita ikki síni livandi rá›. Valmøguleikarnir eru ov nógvir. Eg veit ikki um valmøguleikarnir kunnu vera ov nógvir. Frælsi› at sleppa at royna tær útbúgvingar, ein hevur hug til, er nógv vert - og solei›is hevur ikki veri› nú í mong ár.

Ábyrgd

Vi› frælsi fylgir ábyrgd. (Hesi or›ini haldi eg vit hava hoyrt fyrr!). Kanska var ta› eisini ábyrgdina, nevndi rektari sipa›i til, tá hon helt, at tey ungu vóru so ótrygg - tí møguleikarnir vóru ov nógvir. Ta› var onkursvegna lættari, tá onnur tóku avger›irnar, t.d. avmarka›u tali› av útbúgvingarplássum. Fleiri møguleikar seta størri krøv til ábyrgd, til at tora, at taka avger›ir.

Fíggjarliga eru tit ikki fræls enn, men minnist meg rætt, so vóru størstu projektini tá ikki fíggjarvánirnar, men hvussu best kundi fáast burtur úr teimum longu vikuskiftunum. Og strævi› kundi ta› eisini vera.

Og vi› frælsinum kundi ta› eisini kennast so sum so, tá hormonini gjørdu um seg, komu uppá tvørs á øllum planum. Og so ver›a ta› allarhelst hesi, sum koma at hava avgerandi t‡dning fyri lívslei› tykkara. Tilvildini mugu vit eisini rokna vi›. Vit kunnu ikki velja okkum fram til alt.

Tvey projekt fyri framman

Fyri framman ligga 2 stór projektir og bí›a eftir tykkum. Tveir maktpolar sum hála í og kappast um tykkum.

Fyri 50 árum sí›ani, tá ommur og abbar tykkara - og serliga abbar - gjørdust pisur, var ein pisurø›u neyvan n‡tt sum pallur at fortelja vælútbúnum pisum, at tær skulu n‡ta evnir og orku eisini til at fjálga um heimalívi›. Heimalívi›/fam.lívi› var ikki naka›, sum alment var tosa› um. Fólk kendu sítt pláss.

Familjulívi›

Solei›is er ikki í dag. Ru›ulleiki valdar innan familjuna og ávirkar útum familjuna, rakar vinnuna og teir almennu kassarnar. Trupulleikin er ikki bert privatur.

Hetta byrja›i tá genturnar fóru at fáa sær útbúgvingar á sama stø›i sum dreingirnir. Og genturnar vildu vinna pening eisini. Tær trá›a›u eftir somu vir›ing og vi›urkenning sum útbúgving og arbei›i góvu dreingjunum. Ta› virksama arbei›slívi› dregur, meiri enn ta› ofta einsamalla lívi› heima vi› hús vi› barnaansing, matger› og vaksing - og ongari inntøku.

Henda kollveltingin vi› gentunum, sum vit síggja eisini er galdandi fyri Su›uroynna, og sum er kanska ein tann størsta kollvelting seinastu 50 árini, setur nú spor síni í heimalívi›, vinnulívi› og í politiska lívi› eisini innan leingi.

Kollveltandi, tá hugsa› ver›ur um, hvussu stutt ta› er sí›ani, at fremsta uppgávan hjá gentunum var at vera húsmó›ir, og at skúlagongd tí ikki var hildin so ney›ug. Og ma›urin var forsyrgjarin. Restir av einum hugbur›i, sum framvegis sporast. So stutt sí›ani, at hetta var dagligdagurin hjá ommum og abbum tykkara, sum fyri bert 20-30 árum sí›ani vóru rá›andi ættarli›i› í landinum. Ikki so løgi›, at tey politisku tiltøkini so ofta koma haltandi aftaná, nakrar generatiónir ov seint.

Gentur og dreingir, tit fara nú undir ví›ari útbúgvingar og út í vinnuna og innan leingi fara nógv av tykkum at rei›rast, ikki sum pisur, men sum foreldur. Eg rokni tíverri ikki vi› at fara skeiv, tá eg sigi, at neyvan er ru›ulleikin sum valdar í løtuni: at fáa familju/privatlív at sampakka vi› vinnulív, av, tá tykkara túrur kemur.

Hetta ver›ur ein trupulleiki hjá tykkum bæ›i gentum og dreingjum. Tá børnini, sum krevja bæ›i tí› og orku. koma. Tá standa tit aftur fyri einum vali, sum tit nú eru tvey um at taka. Og vali› liggur ikki so beint fyri.

Tr‡sti›, um at fáa familjulív og vinnulív at ganga hond í hond, liggur í dag størri á gentunum enn á dreingjunum. Men hava genturnar ein trupulleika, so fáa tit dreingir ta› eisini - skulu tit liva saman. Til genturnar vil eg siga: at húsmó›iryrki› og umsorganin ikki liggur so langt afturi í bakhøvdi tykkara, koma tit uttan iva at merkja. Nógv tr‡st kemur uttanífrá, frá vinnuni og teimum treytum hon setir, men tr‡sti› kemur eisini frá tykkum sjálvum av egnum krøvum. Sleppi› nøkur av hesum krøvum og sleppi› dreingjunum(makunum) framat. Teir eru kanska ikki altí› so altrá›ir, og skulu vi›hvørt haldast til vi› har›ari hond ella motiverast, men kortini hoyrast teir ofta nøkur ár seinni sita og siga seg hava eina kenslu av at standa uttanfyri familjuna, børnini. Teir sluppu ikki uppí part.

Bá›ir partar hava naka› at læra her, og veruleikin er, at ta› er alney›ugt, at tit sum í dag standa javnbjó›is útbúgvingarliga nú taka felags - og eins stór tøk í heimalívinum. Og bæ›i hava naka› at vinna, tí eitt gott privatlív er onnur helvtin av tí heila lívinum.

Útbúgvingin

Hitt projekti›, sum kanska liggur meiri frammaliga hjá tykkum beint nú, er útbúgvingin og vinnulívi›. Ta› er ein t‡dningarmikil partur av lívinum, og ver›ur kanska tey fyrstu árini dyrka› meiri eldhuga› enn hin privati parturin. Solei›is kann ta› eisini væl vera. Men ansi› eftir ikki at gloyma privata partin - og ta› ver›ur serliga sagt til dreingirnar. Eitt gott lív krevur bá›ar partar, sum í veruleikanum eru treyta›ir av hvør ø›rum.

Studentsprógv

Tit hoyra til tann umlei› 1/3 av einum ungdómsárgangi sum hevur valt at taka studentsprógv. Ein gó› barlast fyri ví›ari útbúgving og persónligari menning.

Ta› sjálvsálit skúlagongdin hevur givi› tykkum, skal haldast vi› líka og styrkjast. Ta› gera tit best vi› at brúka tykkum sjálvi, evnini og orkuna. Tit hava lært sjálvstø›uga stø›utakan, og at formulera tykkum. N‡ti› hesi evnini. Seti› spurningar vi› ta› verandi og veri› ikki bangin alment at koma fram vi› ásko›anum tykkara.

Sjálvsáliti›, sum er so t‡dningarmiki›, veksur ikki av sær sjálvum. Ta› veksur ein tumma hvørja fer› ein fær prógva›, at ta› ein gjørdi ella seg›i, var rætt. Eldhugi og dirvi, sum eru serey›kenni fyri ungdómin eru gó› ambo› til vaskandi sjálvsálit.

Framtí›in

Tá eg frætti, at her í Su›ri vóru bert 8 dreingir, sum gjørdist pisur og 23 gentur, og at tølini í Havnini vóru 73 gentur og 37 dreingir, (á Kamsdali var tali javnt 19/19), á landsplan eru genturnar í stórum fleirtali (% 69 gentur og 31 dreingir) - tá undra›ist eg. Hetta er grei› ábending um, at vi›urskifti í samfelagnum eru, sum gera stø›una fyri gentur og dreingir so ymiska.

Hvat merkir hetta? Hví er ta› so? Hvar eru dreingirnir? Vit kunnu bert gita.

Í Danmark har gongdin er tann sama, helt ein mannligur granskari, at ta› var tí, at skúlin var meiri lokkandi fyri gentur, hóska›i betur til tær, hetta at sita og arbei›a undir skipa›um vi›urskiftum. Ein kvinnuligur granskari helt orsøkina vera, at dreingirnir høvdu lættari vi› at vinna sær skjótan og nógvan pening, og at ikki nógv slík arbei›i eru til genturnar. Hin vegin helt hon eisini, at hetta kundi vera óheppi› fyri dreingirnar í longdini, tá samfelagshjólini aftur fóru at mala spakuligari.

Hetta er vert at hugsa um. Hvar blíva dreingirnir av, og koma tær innaftur í útbúgvingar seinni. Vit hava ongar kanningar á økinum. Løgi›, tá hugsa› ver›ur um, hvønn t‡dning ta› hevur fyri framtí›ar samfelagsstrukturin at vita, hvussu íbúgvarnir skipa seg vi› útbúgvinum, yrkjum osv.

Og ver›ur hugsa› um decentralisering (útja›arapolitikk), og at eitthvørt samfelag krevur bæ›i kynini, er nærliggjandi at spyrja, hvar allar hesar vælútbúnu genturnar eru um nøkur ár og hvar eru dreingir, bæ›i teir sum standa her í dag, og teir sum ikki eru her.

Og vit vita, at ein stø›ugt størri partur av ungdóminum fær størri útbúgvingar.

Vit vænta okkum nógv av tykkum, og gongur sum ta› plagar, so mynda tit ella ein stórur partur av tykkum um eini 20 ár, ta› rá›andi stættina í Føroyum. Tit eru tá í lei›andi størvum innan ta› almenna, privatu vinnuna og í politikkinum. Hvørji tey átro›kani málini tá vera hjá tykkum at grei›a er ikki lætt at at spá›a um vi› tí rúkandi fer›, sum er á øllum. Gó›an byr› og enn einafer› tillukku.

Turi›

Brúkararnir hava als onga frágrei›ing fingi›

– sum bara nøkulunda kann grundgeva fyri verandi n‡tslugjaldi, føstum gjaldi og íbindingargjaldi. Vit settu okkum frá byrjan av fyri, at arbei›a sakliga vi› hesum málinum. Vit valdu tí at byggja okkara grundgevingar á sama grundarlag, sum Hitafelagi› L/f í síni tí› og seinni Fjarhitafelagi› P/f søgdu seg byggja á

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum
Christian Poulsen
Ey›finnur Stefansson
Johan Poulsen
Súni Poulsen

Fyrst í vikuni fingu allir fjarhitabrúkararnir kunningarskriv frá P/f Fjarhitafelagnum. Skrivi› er í fullari longd endurgivi› sum vi›merking í Sosialinum 18. oktober.

Í hesum skrivinum váttar Fjarhitafelagi› alment nakrar av teimum skeivleikunum, sum eigarafeløgini í Hoyvíkshaganum og Fjarhitanevndin hava víst á vi›víkjandi prísásetingini á fjarhita.

Vit skulu ikki fara í smálutir vi› øllum, men halda okkum til nakrar høvu›sættir. Máli› er gjølligari l‡st í skrivi til B‡rá›i› tann 8. oktober og í 4 hjáløgdum notatum, sum eru á heimasí›uni hjá Eigarafelagnum Lítlagil www.litlagil.com.

N‡tslugjaldi›

Tá vit keypa 1 kWh av orku frá Fjarhitafelagnum, skulu vit gjalda 43% meira fyri henda kilowatttíman, enn vit høvdu goldi›, um vit keyptu samsvarandi orkunøgd í olju.

Hesin prísmunurin framgongur eisini av uppl‡singunum í kunningarskrivi Fjarhitafelagsins.

Brúkaraumbo›ini vilja hava eina gó›a grundgeving frá Fjarhitafelagnum upp á hendan prísmunin ella eina príslækking. Í stuttum er hetta ósemjan um n‡tslugjaldi›.

Fjarhitafelgi› hevur sagt, at hesi 43 %´ini eru ta›, sum vit vildu brúkt meira um vit høvdu oljuf‡ring. Og hetta er væl at merkja hiti, sum hev›i fari› til spillis.

Vit eru grei› yvir, at naka› meira av orku fer til spillis í einum oljuf‡rdum ketli enn í eini fjarhitaskipan, men ikki 43%, og langt frá tí. Hetta vístu vit á í eini frágrei›ing í mars 1998, har vit samstundis vístu á, at Fjarhitafelagi› (og Hitafelagi› L/F undan teimum) misn‡ttu ta› grundarlagi›, sum teir sjálvir søgdu seg byggja á.

Seinni sama ár ásanna›i Fjarhitafelagi› helst, at grungevingarnar fyri prísleguni hildu ikki. Tá skifti fjarhitaveitarin - aftaná 10 ár - grundgevingar fyri støddini á n‡tslugjaldinum. Teir gjørdu nú av, at fjarhitaverk eru munandi bíligari í vi›líkahaldi og endurn‡gging enn oljuf‡rdir ketlar, og hesin munurin ver›ur sí›ani tikin vi› sum partur av grundgevingini fyri n‡tslugjaldinum.

Eingin sum helst dokumentasjón ver›ur givin fyri hesum pástandunum, og vit hava meira enn varhugan av, at ta› fyriheldur seg beint tvørturímóti. Tey eru nógv, sum hava havt stórar og d‡rar umvælingar á fjarhitavekslararnar.

Hvat endurn‡gging (avskriving) vi›víkur, so heldur pástandurin heldur ikki. Vit eru vitandi um fleiri húsarhald, sum hava veri› noydd at skifta hitavekslararnar út 8-9 ára gamlar. Hetta hevur kosta› teimum umlei› 17.000 kr umframt arbei›sløn.

Vit kunnu spyrja: "Hvussu nógvir ketlar og oljuf‡r munnu vera skift út í 8 ára aldri í Føroyum n‡iga" ?

Fasta gjaldi›

Fjarhitabrúkararnir rinda í dag 480 kr/ár í føstum gjaldi. Hetta hevur øll árini veri› nevnt eitt tænastugjald, sum skuldi samsvara vi› ta›, sum onnur gjalda fyri oljuf‡rstænastu.

Eftir tógvi strí› eydna›ist okkum at fáa Fjarhitafelagi› at ásanna, at brúkararnir fingu líti› ella einki fyri fasta gjaldi›. Hetta hendi aftaná, at Fjarhitafelagi› skrivliga hev›i bo›a› frá, at teirra ábyrgd bert gongur til høvu›sventilarnar, og at teir tí ikki arbei›a upp á fjarhitaeindina hjá brúkarunum.

Okkara ni›urstø›a er grei›. Vit kunnu ikki brúka ein tænastuveitara, sum ikki kann arbei›a upp á hitavekslaran og ei heldur hevur eykalutir til hann. Fasta gjaldi› eigur tí at ver›a strika›.

Nú hendir ta› løgna, at Fjarhitafelagi› skiftir grundgeving fyri fasta gjaldinum eisini. Teir bo›a nú skrivliga frá, at at ta› fasta gjaldi› er ásett fyri at samla›i kostna›urin av at n‡ta fjarhita skal vera tann sami, sum hjá teimum, sum n‡ta olju til upphiting. Ta› vil siga, at fasta gjaldi› er vor›i› til eitt útjavningargjald.

Seinni hava vit fingi› onkra a›ra grundgeving, sum gevur líka so lítla meining.

Hví nevnir fjarhitafelagi› ikki fasta gjaldi› í kunningarskrivinum til brúkararnar?

Íbindingargjaldi›

Vit skulu ikki gera stórvegis vi›merkingar til hetta gjaldi› á hesum sinni, men kunnu vísa til notat okkara um hetta á heimasí›uni www.litlagil.com. Okkara ni›urstø›a er, at íbindingargjaldi› átti at veri› sett ni›ur í helvt, ella gott og væl ta›.

Ni›urstø›a

Brúkararnir hava als onga frágrei›ing fingi›, sum bara nøkulunda kann grundgeva fyri verandi n‡tslugjaldi, føstum gjaldi og íbindingargjaldi. Vit settu okkum frá byrjan av fyri, at arbei›a sakliga vi› hesum málinum. Vit valdu tí at byggja okkara grundgevingar á sama grundarlag, sum Hitafelagi› L/f í síni tí› og seinni Fjarhitafelagi› P/f søgdu seg byggja á.

Or›askifti›, sum var vi› Fjarhitafelagi› í næstan 3 ár um máli› hevur víst, at Fjarhitafelagi› hevur ongan vilja til at vi›gera máli› á sakligum grundarlag, og teir skifta grundgevingar hvørja fer› teir renna seg fastan vi› teimum gomlu.

Vit hava tí ikki stórvegis grund til at seta Fjarhitafelagnum fleiri spurningar, men vit hava allar gó›ar orsøkir til at bi›ja um eina frágrei›ing frá b‡rá›num:

o Heldur b‡rá›i›, at ta› er rímiligt, at Fjarhitafelagi› uttan ví›ari skiftir grundgevingar fyri prísunum, tá brúkararnir vísa á skeivleikar í prísgrundarlagnum?

o Heldur b‡rá›i› ta› vera rímiligt, at Fjarhitafelagi› brúkar egnar ódokumentera›ar pástandir sum grundarlag undir prísunum.

o Ætlar b‡rá›i› sær at gera sínar egnu ni›urstø›ur í málinum?

Brúkararnir hava fingi› eitt lyfti um, at teir ongantí› skulu gjalda meira fyri fjarhitan, enn teir vildu goldi›, um teir brúktu olju til upphiting.

Vit halda okkum framvegis hava eina gó›a sak, og fara ikki at sleppa hesum málinum. Næsta stigi› ver›ur at brúkararnir fara at venda sær til b‡rá›i› enn eina fer›.

Hoyvík, 19. oktober 2000

SANSIR TEL 355355

Skrivstovufyrisitari/
Skrivari til Agip í Føroyum

Agip Faroe Branch søkir eftir royndum skrivstovufyrisitara/skrivara. Hetta er eitt nýtt starv við ábyrgd at veita fyrisitingarligar-, skrivara- og móttøkutænastur fyri øll starvsfólkini, ið starvast ella vitja skrivstovuna hjá Agip Faroe Branch.

Uppgávan hjá skrivstovufyrisitaranum/skrivaranum er sera áhugaverd og avbjóðandi. Hetta er ein møguleiki hjá rætta viðkomandi at vera við til at seta á stovn eina nýggja skrivstovu, uppbyggja skjalaskipan, fyrireika ferðing/gisting, umsiting av lønarútgjaldingum, umframt dagliga at veita hollar umsitingarligar- og skrivaratænastur.

Umsøkjarar eiga at hava viðkomandi handils-/skrivara førleika, hava góðan teldukunnleika, og fleiri ára royndir við fjølbroyttum uppgávum innan skrivstovuyrki. Høgt støði í skrivligum og munnligum enskum er ein avgjørd treyt. Góð samskipanarevni saman við einum professionellum og smidligum hugburði til arbeiðið, er ein treyt fyri starvið.

Løn sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Inga Højgaard á telefon 311260 ella 314118.

Umsóknin, sum skal vera á enskum, skal sendast til:

Agip Faroe Branch
Yviri við Strond 4
Postsmoga 359
FO-110 Tórshavn
Att. Ingi Højgaard, deildarstjóri

Umsóknarfreistin er 9. november 2000.

Agip Faroe Branch er partur av Italska orkufelagnum Eni, sum er eitt av heimsins størstu. Eni hevur virksemi í fleiri enn 70 londum, og hevur umleið 75.000 fólk í arbeiði. Eni hevur virksemi í øllum pørtum í kolvetnisvinnuni, íroknað olju og gas, petrokemi, tænastur til oljuleiðir og verkfrøði.

Agip hevur, sum fyristøðufelag, fingið tillutað tvey oljuloyvi á føroyskum øki.

Eni GROUP
Agip Faroe Branch